## Floghavn er nú P/F

Landsstýrismaðurin í Vinnumálum, Bjarni Djurholm, hevur í dag stovnað P/F Vága Floghavn. P/F Vága Floghavn er sett á stovn við tí endamáli at reka floghavnsvirksemi og aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi. Í nevndini hjá P/F Vága Floghavn sita: Kitty May Ellefsen, Andras Róin, Jóhan í Niðristovu, Árni Arge og Evy Jacobsen. Flogvallarovastin, Finnbogi Niclasen, er settur sum stjóri í P/F Vága Floghavn.



## Vatn drekkast aftur

Fyri nøkrum døgum síðani sendi Tórshavnar kommunu skriv út til fleiri stovnar í høvuðsstaðnum um at kóka vatnið, tí vandi var fyri, at vatnið var dálkað. Nú vísir tað seg, at eingin vandi er við at drekka vatnið í høvuðsstaðnum. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur tikið royndir av vatninum, og royndirnar vísa, at ongar vandamiklar bakteriur eru í vatninum. Hetta visti Útvarpið at siga í gjárkvøldið. Í morgin fara stovnarnir at fáa boð um, at teir ikki nýtast at kóka vatnið longur, og tí kunnu børn og gomul drekka kranavatn aftur í Havnini.

# n føroying



avbjóðingin verður, liggur ikki fast enn. Familjan hevur tó gjørt av, hvar í Danmark tey skulu búgva.

- Vit hava keypt íbúð á Amager, tí vit máttu jú finna ein skúla til yngstu dóttrina, sum fer í sjeynda flokk eftir summarfrítíðina. Men hvussu framtíðin annars verður, havi eg onga støðu tikið til. Fyribils arbeiði eg her til 1. juli, og so fer fyritøkan í summarfrí, og tað fari eg eisini. Tá hon er av, taki eg støðu til, hvat síðani skal henda, sigur Klaus Rasmussen, sum kortini viðgongur, at hann hevur størv í boði í Danmark.

### Brenna ongar brýr

Tá vit spyrja Klaus, um hann nú fer at royna okkurt nýtt, fyri síðani eftir nøkrum árum at venda aftur til sítt gamla starv sigur hann, at tað er ikki ætlanin.

- Eg ætli mær at royna okkurt nýtt, punktum!, sigur hann.

Men hann sigur samstundis, at tey ikki ætla sær at selja húsini, tey skulu verða verandi, um ikki annað so sum summarhús.

- Vit koma aftur til Føroya at ferðast, eingin ivi um tað. So tað verður á ongan hátt talan um at brenna nakrar brýr, nú vit flyta til Danmarkar at búgva, sigur Klaus Rasmussen.

Tíðin at flyta er annars hin allarbesta fyri familjuna. Elsti sonurin, Rasmus, hevur búð nøkur ár í Danmark, Kristina verður liðug við student nú, og ætlar sær kortini niður at lesa. Næstyngsti drongurin hevur tikið 10. flokk á einum eftirskúla á Fjóni, og hevur tískil verið niðri í eitt ár, og hin yngsta skal í 7. flokk eftir summarfrítíðina. Og hon gleðir seg at sleppa til Danmarkar at búgva.

Eisini Klaus sjálvur gleðir seg til ein nýggja gerandisdag.

- Sum grannskoðari livir og arbeiðir tú eftir einum kalendara. Alt er lagt í fastar karmar. Tú ert á sín vís sum bundin í tjóðri. Tú hevur títt starv, og tú hevur tína tagnarskyldu; og tað er ikki alt, tú kans tilláta tær at gera, um fólk skulu taka teg í álvara, sigur hann.

Men Klaus Rasmussen hevur eisini í sínum starvi sum grannskoðari verið nýttur í nógvum øðrum høpum, eisini hjá tí almenna í ymsum arbeiðsbólkum. Seinast sum limur í strategibólkinum fyri samfelagsbygnað í sambandi við Visjón 2015. Eisini hevur hann verið limur í Oljuráðleggingarnevndini hjá Oljufyrisitingini í Landsstýrinum.

Eisini í vanliga arbeiðinum við kundunum hevur verið nógv ráðgeving, og tað heldur Klaus Rasmussen hevur verið ógvuliga spennandi at fingist við. Tað hevur verið tíðarkrevjandi og til tíðir eisini stressandi, men fram um alt spennandi.

### Glaður fyri Føroyar

Hvussu hava so hesi 25 árini í Føroyum sum grannskoðari verið?

- Tað hevur verið strævið við longum døgum, men tað hevur fram um alt verið áhugavert. Nógvu arbeiðstímarnir hava gjørt, at eg ikki altíð havi havt líka nógva tíð við familjuni, sum eg kundi ynskt, men hinvegin hevur stuðulin heimanífrá altíð verið ógvuliga stórur, sigur Klaus Rasmussen.

Men ikki bara í arbeiðinum hevur hann trivist væl. Eisini tað fakta, at hann hevur livað hesi 25 árini í Føroyum, er hann fegin um.

- Tá eg havi havt við danskar kundar at gera, ella eg havi verið í Danmark, antin í arbeiðsørindum ella til onnur høvi, so má eg siga, at eg eri glaður um, at eg havi havt mína tilveru í Føroyum. Tað er ein annar máti at liva uppá, sigur Klaus Rasmussen.

Hann hevur, sum so mangir aðrir danir, ið hava búð drúgv áramál í Føroyum, valt ikki at tosa føroyskt. Ikki alment, í hvussu er. Vit spyrja, um orsøkin er, at føroyingar á mangan hátt eru so primitivir, at teir hava hug at gera gjøldur burtur úr fólki, ið royna at tosa føroyskt?

- Ja, nú nevndi tú sjálvur orðið primitivir. Men eg veit ikki. Eg hoyri mangar danar tosa føroyskt, har eg haldi, tað hevði verið frægari um teir tosaðu danskt. So eg vil heldur tosa eitt rímiliga gott danskt, sum øll skilja, enn føroyskt, sum kanska ikki øll skilja. So eg haldi meg til at tosa føroyskt heima við hús við konu og børn, sigur Klaus Rasmussen.

Men árini í Føroyum hava eftir øllum at døma havt sína ávirkan á máli hjá Klaus, tí tað hendir seg meiri enn so, at danir spyrja, hvar hann kemur frá. Okkurt dømi er enntá um, at tey hava ferðast í Danmark, og tá tey so – spurd – svara, at tey koma úr Føroyum, fáa tey ofta kompliment fyri at tosa væl danskt.

- Serliga eg, og so takki eg bara fyri, sigur Klaus við einum brosi á varrunum.

### Føroyingur meiri enn dani

Tá Klaus kom til Føroya, byrjaði hann sum omanfyri nevnt at spæla fótbólt í B36, og kom harvið í samband við hópin av fólki. Klaus var eisini ein sera dugnaligur fótbóltsspælari, so dugnaligur, at hann varð roknaður millum allarbestu leikararnar í føroyskum fótbólti fyrst í 80-árunum. Men tað fæst hann ikki við longur.

- Nei, tað tola knøini ikki. Men eg renni maraton í staðin. Tað er bara beint fram – og so sleppur tú undan taklingunum, sigur Klaus Rasmussen.

So sjálvt um hann og konan í ein ávísan mun íðka dans, serliga latínamerikanskan dans, so er tað renningin, ið hugar honum best.

- Dansur er frálíkur, tí tað er nakað, sum eg og konan kunnu íðka saman, og tað gevur ótrúliga góða motión. Men maraton er tað, mær dámar best. Eg havi luttikið í fleiri kappingum áður, og nú fari eg til New York Marathon, sigur Klaus.

Hann hevur luttikið í trimum kappingum í Keypmannahavn, einari á Norðursælandi og trimum í Berlin. Kendastu kappingarnar eru umframt Berlin og New York eisini London maraton'ið. Og nú stendur sum sagt New York fyri stavn.

Hetta hevur ligið leingi í kortunum, og tá tað varð greitt, at Klaus ætlaði sær vestur um hav, vildi Nicolaj eisini við at luttaka. Og tað var í lagi, pápin skuldi rinda fyri ferðina, um Nicolaj byrjaði at venja.

- Og hann byrjaði longu í fjør, so hann var við til maraton'ið í Berlin. Tað var ein ógvuliga stór uppliving fyri hann, tí har stendur umleið ein millión fólk framvið rutuni og eggjar rennarunum, sum eru einir 40.000 í tali, sigur Klaus.

Og so kom brennandi spurningurin: Kennir tú teg sum føroying ella sum dana?

- Eg haldi eg má siga, at eg kenni meg meiri sum føroying. Eitt syskinabarn hjá mær var við í Berlin, og hann verður eisini við í New York. Hann fann uppá, at vit skulu renna í okkara tjóðardrakt við Dannebrog á, tí fólk eggja altíð mest teimum, ið renna í sínum tjóðarmerki. Tað helt eg at byrja við var fínt, men meiri eg hugsaði um tað, meiri sannførdur gjørdist eg um, at eg kundi ikki renna við Dannebrog sum mínum tjóðarmerki. So nú má eg í býin at keypa mær troyggju í føroysku litunum, sigur Klaus Rasmussen at enda í samrøðu við Sosialin.

### FAKTA UM KLAUS RASMUSSEN

| | |
|---|---|
| **Føddur:** | 23. september 1957 |
| **Útbúgving:** | cand.polit (samfelagsbúskaparfrøðingur) 1982, statsautoriseraður grannskoðari 1993 |
| **Starv:** | Grannskoðari síðani 1982, stjóri í Rasmussen & Weihe síðani 1993 |
| **Giftur:** | Ann Mari Rasmussen, fyrr Olsen |
| **Børn:** | Rasmus 26 ár<br>Kristina 19 ár<br>Nicolaj 17 ár<br>Sarah 12 ár |